Bingovinnararnir

Higartil hava hesi sent okkum fulla plátu — við øllum 15 tølunum, og ynskja vit teimum hjartaliga tillukku. Vinningin fáa tey sendandi ein av fyrstu døgunum.

Per Samuelsen, Fuglafjørður
Sonja Gaard, Tvøroyri
Herluf Johansen, Vestmanna
Elin Maria Jørgensen, Miðvágur
Anna Hjalt Nicodemussen, Sandur
Jacob Johannesen, Húsar
Jóna Hammer, Oyndarfjørður
Ingeborg Djurhuus, Torfinsgøta 4, Tórshavn
Sirið Sørensen, Porkeri
Høgni Mohr, Vágur
Ester Mikkelsen, Vágur
Solveig Joensen, Koltur
Heidi Davidsen, Runavík
Evald Suni Poulsen, Eiði
Finnur Johansen, Vestmanna
Maria Simonsen, Sundsvegur, Tórshavn
Eyð Skoubo, Sandur
Pauli í Sandagerði, Doktara Dahls-gøta 15, Tórshavn
Marjun Vestergaard, Vágur
Eydna M. Jensen, Tjarnalág 35, Tórshavn
Henrikka Joensen, Sandavágur
Finngerð Johansen, Vestmanna
Petrina Hansen, Vestmanna
Anna Reinert, Landavegur 113, Tórshavn
Jóna Thomassen, Sandavágur
Aslaug Joensen, Vestmanna
Johannes Olsen, Sandavágur
Súsanna Olsen, Sandavágur
Andreas Højgaard, Vestmanna
Hans Eivinson Dam, Marknagils-vegur, Tórshavn
Anfinn Brekstein, Velbastaður
Terje Nielssen, Nes Vágur
Birita Thomasen, Tjarnalág 19, Tórshavn
Marianna Matras, Heiðavegur 15, Tórshavn
Amanda Zachariasen, Tórshavn
Sanna Holm, Tvøroyri

So er BINGO liðugt fyri hesaferð. Mánakvøldið varð drigið millum tey, sum høvdu sent okkum plátuna við í minsta lagi 10 røttum, og gjørdist Hans E. Johannesen, lærari í Norðdepli hin hepni vinnarin.

Tá vit mánakvøldið høvdu samband við hann fyri at ynskja tillukku við vinninginum stóð hann júst og kruvdi. Teir høvdu sett nót eftir seiði, og høvdu fingið nógv meir enn teir kundu taka ímóti. Hann greiddi okkum frá, at síðani byrgingin kom hevur verið so nógvur seiður har sum ongantíð áður. Heldur ikki hava teir sæð so nógva sild har norðuri sum nú, so her er gott at hava bát, legði hann afturat.

Myndin í HORNINUM í dag er eitt av teimum uppskotum vit hava fingið frá lesara í skemti-myndakappingini. Vit takka fyri hjálpina. Blómuvirðisløn til lesaran frá Urtagarðinum í Kirkjubø, er á veg, hóast hesin helst ikki vildi vera navngivin í blaðnum.

Vit hava aftur hesaferð eina nýggja mynd, sum vit fara at biðja lesarar seta ein skemtiligan og hóskandi tekst til. Minnist til — tað loysir seg. Allar myndir við tekstuppskoti frá lesarum sum koma í blaðið, fáa virðisløn.



Vit vilja eisini samstundis minna á tekni- og fotokappingina. Sendið okkum myndir og tekningar skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 15. desember. Eisini til hesar kappingar eru frálíkir vinningar.

Mynd at seta orð til



dagbókin

Norea Radio Danmark

Í dag: »Jesus — vejen til Himlen!« Johs. Schüsler, innrimissionerur, talar. Sela-kvartettin, Leif Evald og Thomas Evald syngja.

Kirkjukvøld í Vesturkirkjuni

Í annaðkvøld kl. 19.30 heldur Kjartan Mørkøre fyrilestur um tríeindarstriðið í 4. øld, arianismu.

KFUM, Tórshavn

Opið hús fríggjakvøld kl. 20-23.

Basarur í KFUK

Hóskvøldið og fríggjakvøldið verður basarur í KFUK, Tórshavn. Bæði kvøldini letur upp kl. 19.

Várgleði


Í dag: vit gera klárt til basarin.

Almennur fyrilestur um Victor E. Frankl

Hvør er hesin maður, og hvat hevur hann avrikað?

Í almennum fyrilestri á Fróðskaparsetrinum **hóskvøldið 6. desember kl. 20.** gevur Johan Weihe, prestur, eina lýsing av eysturríkska sálarfrøðinginum Victor E. Frankl og teim avleiðingum, sum sjónarmið hansara koma at fáa fyri skúlaskapin.

Maskinovasti



Fyrsti maskinovasti, Mortan Johan Hansen, úr Havn, er útnevndur til maskinovasta í reiðarínum A.P. Møller.

Mortan, sum er sonur Hans hjá Lutherus, hevur starvast innan Mærsk síðan 1972. Í 1975 varð hann útnevndur til maskinmeistara.

Eftir at vera útnevndur til maskinovasta, er Mortan J. Hansen farin við Mærsk Handler, sum er í vinnu í Reyða Havinum.

brúkarateigurin

Innflutt vøra

Brúkari hevur vent sær til okkara, og greitt frá at íslendskt kjøt mrkt. DIIX verður selt fyri sama prís, sum kjøt mrkt. DI. Vit fara tí, eftir áheitan, einaferð enn at seta hesi merki í teigin.

a. KHB, KVV, KASK ella KL er stytting av navninum á slaktarínum.

b. Tølini á spjaldrinum merkja vektbólkar,

talið 2- krovini eru ímillum 13-16 kg.

talið 4- krovini eru ímillum 19,5—22,5 kg.

talið 8- krovini eru ímillum 16,5—19 kg.

talið 6- krovini eru upptil 12,5 kg.

Er krovið merkt DI6 t.d., er hetta fyrsta sortering. Er tað harafturímóti merkt DII6X, er hetta onnur sortering, og er tað merkt DIII6 XX, er hetta triðja sortering. Sama er við tølunum 2,4 og 8. Við øðrum orðum, frámerki X ella XX vísir til eina aðru ella triðju sortering. Aftanfyri á spjaldrinum stendur navnið á djóralæknanum, ið hevur góðskumett kjøtið, og síðani er stemplað árstalið fyri slaktið.

Tá kjøtið fær frámerkið DIIX ella DIIIXX er tað tí, at dygdin ikki er tann sama, sum í fyrsta floks kjøti og tá er tað órímuligt, at vit skulu gjalda sama prís, sum fyri fyrsta floks kjøt. Tað er eingin umbering, at seljarin ikki kennir tey ymisku stemplini á kjøtinum, tí brúkarin má krevja, at tann, ið heldur seg til at selja matvørur, veit hvat tað er, hann bjóðar fram.

So er spurningurin: hvørja trygd hava vit fyri at góðskan ikki er versnað á veg higar. Hvussu er kjøtið goymt á túrinum til Føroyar. Brúkarin bíðar tolin eftir lóggávu, ið krevur eftirlit við vørum, ið verða fluttar til landið og góðskumetan av vørum, framleiddar her á landi.

Frítt at keypa:

Træspritt og nervaeitur

Lógin um sølu av ymiskum eiturevnum (giftlógin frá 1934) krevur at verða endurskoðað.

Eitrandi evni, sum í Danmark t.d., annaðhvørt eru bannað at selja ella, sum skulu hava eiturfrámerki, kunnu framvegis fáast til keyps her í vanligum krambúðum. Hetta eru evni, ið kunnu vera til skaða fyri fólk og fæ, ja, fyri umhvørvið sum heild.

Sum dømi um evni, ið kunnu fáast til keyps her, í fríum handli, men eru bannað í Danmark t.d., kunnu nevnast: Metanol (træspritt), Benzol (steinkolsnafta) og tetraclorkolevni. Brúkarafelagið vil hervið heita á fólk um at lata vera við at nýta hesi evni, tí tað er prógvað, at tey eru hættislig fyri heilsuna.

Í summum krambúðum her kann ein keypa henda týska flugufangaran: **SCHRUMM STRIP mit DDVP und Stabilisator. Der Insekten-Strip mit Langzeit-Garantie.** Apotekið greiðir okkum frá at DDVP er hættisligt nervaeitur, ið als ikki má nýtast innandura, heldur ikki er hetta loyvt at selja í Danmark. Við tað at leiðbeiningin er á týskum, eru tað bert tey fáu, ið duga at lesa hana og tí hendir tað meira enn so, at fólk hava henda flugufangara hangandi í køkinum ella uppiyvir spísiborðinum. Brúkarafelagið fer tí at biðja fólk, ið nýta hesar flugufangarar, um at beina fyri teimum, og tað sama eiga krambúðirnar, ið selja teir, at gera. At enda kann skoytast uppí, at Brúkarafelagið hevur vent sær til Føroya Landsstýrið við áheitan um at fáa endurskoðað lógina sum skjótast.

Hava tygum einhvønn spurning til Brúkarafelagið, eru tygum vælkomin at ringja tlf. 15478 aftaná kl. 18 ella skriva til Brúkarafelagið v/ S. Dalsgaard, Hoydalar, Hoyvík.